# HEILSANIR



**Góði Hans Jákup**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum. Eisini ein heilsan til Tanju og Jógvan Andrias.
**Heilsan langomma á Bakkanum**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið vóru við at gera hjúnabandsdag okkara 15. mars 2008 so hugnaligan og minnisríkan. Vit ynskja øllum Harrans signing í komandi ári.
**Anna og Johan Berg**



**Góði Hallur**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum sum var 29. desember. Jesus pápi signi teg og framtíð tína. Asbjørg, Maria, Elisabeth og Vár fáa eisini eina heilsu. Kærastu og bestu ynskir til tykkum.
**Frá mammu**



Hjartans tøkk øll tit, ið gjørdu okkara hjúnabandsdag, 26. juli 2008, so hugnaligan, stuttligan og minnisríkan. Takk fyri góða hjálp, heilsanir, talur, framførslur og fjarrit. Við ynski um Harrans signing í framtíðini.
**Heilsan Hallgerð og Ovi**



Ein hjartans tøkk til tykkum mongu, sum gleddust saman við okkum, og gjørdu okkum hjúnabandsdagin ógloymandi. Takk fyri gávur, blómur, sangir, talur, køkur, fjarrit og heilsanir. Eisini ynskja vit øllum alt tað besta í nýggja árinum.
**Blíðar heilsanir Petra og Jóannes**



**Góði Niels gubbi**
Hjartaliga tillukku við 65 ára degnum 8. januar.
**Heilsan Martin, Egil og Joan**



**Góða Jórun**
Hjartaliga tillukku við teimum 60 árunum. Takk fyri alt, sum tú ert fyri okkum.
**Kærar heilsanir maður tín, og vit 6 ommubørnini**



**Góði fitti Ári**
Hjartaliga tillukku við 13 ára degnum 9. januar. Gleða okkum til at koma í føðingardag hjá tær. Jesus pápi signi lívsleið tína.
**Muss muss frá ommu og abbi á N. Horn**



Eina hjartans tøkk til tykkum mongu, sum gleddust saman við okkum, og gjørdu hjúnabandsdagin ógloymandi. Takk fyri gávur, blómur, sangir, talur, fjarrit og heilsanir. Eisini ynskja vit øllum alt tað besta í nýggja árinum.
**Blíðar heilsanir Anita og Bergur**